Sørvágs Kommuna
FR-380 Sørvágur . Tlf. +298 32004/33122 . Fax +298 32952

# Kunningarskriv 2000



Árið 2000 lækkar eins og setandi sól, og um bert skamma stund eru vit aftur á gáttini til eitt nýtt árskifti, har vit fyri seinastu ferð í hesum valskeiðnum fara at nýta høvi til at kunna okkara borgarar um støðuna farna árið.

Bygdaráðið hevur havt sekstan fundir í skjótt farna árinum og viðgjørt umleið hundrað mál: byggiloyvir - sundurbýti - stuðlar - leigusáttmálar - skattamál - umfigging av lániskuld o.a.

Fíggjarætlanin fyri ár 2001 var til triðju og seinastu viðgerð á bygdaráðsfundi 06.12.00 og endaliga samtykt. Metta skattskylduga inntøkan er 100.000.000 kr, og úrslitið áðrenn avdrátt verður kr. 1.029.659. Skattaprosentið komandi ár fer úr 21 prosentum niður á 20,5 og barnafrádrátturin verður kr. 2500. Viðvíkjandi kirkjuskattinum er at siga, at framyvir verður sama prosenttal (0,3%) fyri allar bygdir, og tað verður avroknað beinleiðis yvir gjaldstovuna. Fíggjarætlanin fyri komandi ár er treytað av góðkenning av landsstýrinum, sum ikki fyriliggur enn.




Fíggjarætlanin fyri ár 2001 hjá Felagskommununi í Vágum er kr. 240.000. Henda upphædd verður býtt soleiðis, at helvtin verður deild í mun til skattskyldugu inntøkuna fyri árið 1999, meðan hin helvtin verður býtt í mun til fólkatalið í kommununum 01.01.2000. Samlaða býtið fyri ár 2001 verður: Sandavágs Kommuna kr. 63.345,96 - Miðvágs Kommuna kr. 85.836,69 - Sørvágs Kommuna kr. 83.133,56 - Biggjar Kommuna kr. 6.542,49 og Mykines Kommuna kr. 1.141,30

Granskoðaði roknskapurin fyri 1999 hjá Sørvágs Kommunu var framlagdur og góðkendur á bygdaráðsfundi 15.12.00. Ársroknskapurin vísir ein rakstur, sum javnvigar við kr. 22.379.268 og eina fíggjarstøðu, sum javnvigar við kr. 26.553.392. Í fíggjarætlanini fyri 1999 var roknað við einum avlopi áðrenn avdráttir uppá kr. 2.616.000. Roknskapurin vísir eitt avlop uppá kr. 3.182.000.




Arbeitt hevur í longri tíð verið við at fáa skipaði viðurskifti viðvíkjandi sáttmálum við starvsfólkini hjá Sørvágs kommunu, og í ár hevur so tann seinasti bólkurin - dagrøktarmammurnar í bygdini - undirskrivað sáttmála við Starvsmannafelagið við gildi frá 01.09.00, so nú eru øll starvsfólk hjá Sørvágs kommunu komin undir skipaði sáttmálaviðurskifti.

Viðvíkjandi barnaansing eru hendar ymiskar broytingar í farna ári. Kommunurnar hava frá 01.07.00 yvirtikið alla barnaansing, meðan tað almenna hevur yvirtikið allar sosialar útreiðslur.

Bygdaráðið hevur á fundi 22.06.00 samtykt at skilja dagrøktina frá barnagarðinum og at seta ein leiðara fyri dagrøktina. Somuleiðis var samtykt at uppnormera dagrøktina frá 15 børnum til 25 børn í aldrinum 0 - 7 ár. Seinni í ár er so aftur samtykt at uppnormera barnagarðin frá 25 børnum til 30 børn.

Leiðari fyri dagrøktina í Sørvági er Laila F. Simonsen, og í samband við uppnormeringina eru frá 01.09.00 settar tvær dagrøktarmammur aftrat, so nú eru seks dagrøktar = mammur: Hanna Ole-Jacobsen - Hervør Leonson - Karla Simonsen - Gunvør Falkvard - Herborg Lauritsen og Hervør Heinesen. Dagrøktarleiðarin er at hitta á telefon 21 31 22.

Sambært nýggju dagstovnalógini, sum kom í gildi 01.07.00, skal veljast eitt foreldraráð fyri hvønn dagstovn og hvørja dagrøktarskipan, tó ikki sjálvsognarstovnar, sum gevur leiðaranum ráð og vegleiðing. Ráðið skal arbeiða fyri at bøta og styrkja um samstarvið ímillum foreldrini, stovnin og kommununa. Í foreldraráðnum fyri dagrøktina hjá okkum eru vald Sigurð Jan Tavsen, formaður - Astrid Berglið, næstformaður og Maria Joensen, skrivari. Varalimir eru Eyð Ellingsgaard, Anfinn Frederiksen og Allan Joensen.

Lyklatøl fyri Sørvágs Kommunu 95-2001




Í kreppuárunum var neyðugt at gera eina solidariska láni=skipan fyri allar kommunur í Føroyum, sum gekk út 31.11.00. Skuldin hjá Sørvágs Kommunu sá soleiðis út: Føroya Banki kr. 4.434.726,84 - Tryggingarnar kr. 6.692.052,41 - Kommunekredir kr. 75.301,21 - Nykredit kr. 9.192.322,31 - íalt kr. 20.394.402,77

Í samband við umfiggingina av skuldini fingu vit tilboð frá Føroya Banka, Føroya Sparikassa og Landsbanka Føroya. Bygdaráðið samtykti at taka av tilboðnum frá Føroya Banka, sum yvirtók alla okkara lániskuld. Haraftrat samtykti bygdaráðið at minka meira um skuldina við at niðurgjalda eyka kr. 5.000.000 av innistandandi. Sostatt er skuld okkara í dag íalt kr. 15.394.402,77.Lániavtalan við Føroya Banka inniber, at um alt gongur sum ætlað, so er Sørvágs Kommuna skuldarfrí um sjey ár.

Lyklatøl fyri Sørvágs Kommunu 95-2001



Havnameistari okkara seinastu árini, Pauli Jensen, segði upp í summar, og bygdaráðið hevur sett Heðin Jørgensen sum nýggjan havnameistara frá 01.06.00. Havnaskrivstovan er opin allar yrkadagar frá kl. 8 - 17 og havnameistarin er at hitta á telefon 33 20 46 ella 21 52 46.

Byggisamtyktin fyri Sørvágs Kommunu gekk út 01.01.00, og tí var samtykt á bygdaráðsfundi 22.02.00 at leingja verandi byggisamtykt fram til 01.01.2003, meðan arbeitt verður við at fáa eina nýggja broytta og meira tíðarhóskandi byggisamtykt.

Fólkatalið hevur seinastu árini kvinkað seg spakuliga uppeftir. Við ársenda í fjør vóru vit 888 fólk, meðan vit 28.12.00 eru blivin 904 íbúgvarar í Sørvági. Hetta er sjálvsagt at fegnast um, og vónandi gera tær batnandi tíðirnar, at vit fjølgast enn meira. Hyggja vit eftir íbúðarmynstrinum, sær støðan soleiðis út: Íalt eru umleið 340 hús í bygdini. Av teimum standa um 25 tóm ella partvís tóm. Í umleið 85 húsum er bert eitt fólk og í umleið 85 húsum tvey fólk. Í umleið 50 húsum eru trý fólk, meðan í umleið 90 húsum eru fýra fólk og fleiri.

Í samband við at fólk vilja seta búgv í bygdini, er tað soleiðis, at kommunan eigur nøkur grundstykkir og kann vísa á onnur, men tað eru fleiri umbiðin, so kommunan fer aftur í ár at heita á fólk, sum eiga og vilja selja stykkir, sum liggja soleiðis fyri, at farast kann undir bygging, um at siga kommunuskrivstovuni frá, hvar stykkini liggja og kostnaði.

Játtanin til ung í arbeiði er nógv skerd í ár. Vit fingu bert kr. 36.371, og tí var bert pláss fyri einum luttakara, og er tað ein ung genta, sum arbeiðir í dagrøktarskipanini.

Sørvágs kommuna hevur ialt inngoldið kr. 2.782.488,00 til Kommunala kreppulánsgrunnin, og í samband við løgtingslóg um at hjálpa teimum fíggjarligu harðast raktu kommununum í landinum, er ikastið frá okkum til hesa hjálp kr. 634.348,07. Helvtina av restini hava vit fingið útgoldið nú um miðjan desember - kr. 1.074.069,92, meðan hin helvtin enn skal standa sum partur av veðhaldi hjá teimum kommununum, sum hava fingið lán frá Landsbankanum.

Aftur í ár fara vit at minna fólk á, um ikki at seta burturkast frá sær uttan fyri bingjuplássið, og eisini skal minnast á - eins og í fjør - um at skera burtur vøkstur sum veksur út um garðamarkið til almennan veg, tá hetta er til stóran ampa fyri bilarnar.



Frá fyrireikarunum av nýggjárshaldinum skal verða sagt frá, at blikkini verða tendrað u.l. kl. 23 - 23[30]. Niðri á Oyruni verður bál og kl. 01 verður farið inn í dansistovuna, har Eivin Jacobsen - komandi bygdaráðsformaður - heldur miðnáttarrøðuna og Sørvágs Tónleikarafelag luttekur. Til seinast verður farið upp á gólv.

## Bygdaráðsval var 21.11.2000 og var úrslitið hetta:

| | Val 2000 | % | Valdir |
|---|---|---|---|
| Listi A | 224 | 44,9 | 3 |
| Listi B | 87 | 17,4 | 1 |
| Listi C | 188 | 37,7 | 3 |
| | | | |
| Atkvøður | 499 | | |
| Valrætt-Vallutt. | 661 | 75,5 | |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Listi A | 224 | Listi B | 87 | Listi C | 188 |
| Listin | 0 | Listin | 0 | Listin | 1 |
| Dora Hansen | 6 | Sólva Thomassen | 39 | Eiley Thomassen | 21 |
| Eivin Jacobsen | 85 | Leila F. Simonsen | 9 | Berg Rasmussen | 25 |
| Holgar Jacobsen | 31 | Randi Zachariassen | 2 | Thordis Skaalum | 19 |
| Jákup S. Lauritsen | 32 | Eydna Poulsen | 12 | Valdemar Simonsen | 16 |
| Helgi Mouritsen | 11 | Herborg Lauritsen | 3 | Elida Falkvard | 0 |
| Rasmus Mouritsen | 9 | Anita Góðadal | 5 | Erik Davidsen | 59 |
| Kristian Olsen | 32 | Poula Davidsen | 0 | Oddmar Selfoss | 6 |
| Ivan Simonsen | 18 | Andrias Berglíð | 7 | Herálvur Jacobsen | 38 |
| | | John Lauritsen | 10 | Elisabeth Falkvard | 3 |

Tey, ið manna nýggja bygdaráðið, eru: Eivin Jacobsen - Erik Davidsen - Sólva Thomassen - Herálvur Jacobsen - Kristian Olsen - Jákup Suni Lauritsen og Berg Rasmussen.

| | Roknskap: | Roknskap | Roknskap | Roknskap | Framrokna | Fíggjarætlan |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ársúrslit:** | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | **2001** |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| **Skuld:** | | | | | | |
| Føroya banki | 7.843.767 | 7.375.206 | 6.433.107 | 5.295.014 | 15.400.000 | 13.200.000 |
| Tryggingarstovnar | 9.417.255 | 9.417.254 | 8.799.612 | 7.667.981 | 0 | 0 |
| Kommunukredit | 95.809 | 95.809 | 89.613 | 81.506 | 0 | 0 |
| Nykredit | 15.207.046 | 14.301.161 | 12.557.601 | 10.557.147 | 0 | 0 |
| Onnur lán | 19.104 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **Lán íalt** | **32.582.981** | **31.189.431** | **27.879.933** | **23.601.648** | **15.400.000** | **13.200.000** |
| Veðhald | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 | 50.000 |
| Ognarar | 430.383 | 370.738 | 286.110 | 621.407 | 341.505 | 322.505 |
| Millumrokningar | 1.481.361 | 1.806.851 | 2.489.961 | 2.314.510 | 1.239.886 | 310.000 |
| **Skuld íalt** | **34.544.725** | **33.417.020** | **30.706.005** | **26.587.565** | **17.031.391** | **13.882.505** |
| Tøkur peningur | 4.695.756 | 8.155.680 | 9.926.331 | 8.935.757 | 3.044.831 | 3.073.813 |
| Kreppulánsgrunnur | 1.974.899 | 2.782.488 | 2.782.488 | 2.782.488 | 2.782.488 | 2.148.140 |
| Skuldarar | 1.675.740 | 1.447.154 | 1.391.194 | 1.512.072 | 1.266.124 | 1.190.000 |
| Millumrokningar | 517.436 | 621.465 | 779.109 | 1.063.459 | 928.736 | 538.000 |
| Útlán | 1.557.814 | 1.616.580 | 1.569.231 | 1.074.989 | 1.047.000 | 0 |
| **Ogn íalt** | **10.421.645** | **14.623.367** | **16.448.354** | **15.368.766** | **9.069.179** | **6.949.953** |
| **NETTOSKULD** | **24.123.080** | **18.793.653** | **14.257.651** | **11.218.799** | **7.962.212** | **6.932.552** |

Persónliga er hetta ársskiftið nakað serligt fyri meg, nú eg havi tikið avgerðina um ikki at stilla upp aftur til hetta bygdaráðsvalið. Tað er við blandaðum kenslum, nú eg gamlaárs kvøld líti meg aftur um bak og geri støðuna upp. Eg havi lært ein heilan hóp, bæði um meg sjálvan og um okkara borgarar. Hetta hava verið sera spennandi og eisini mennandi ár, men eg má eisini sanna, at átta ár á ovastu rók, tað hevur slitið.

Gera vit støðuna upp fyri tvær tær seinastu seturnar má sigast, at skútan, vit mynstraðu við, fleyt djúpt og hevði ikki sørt av slagsíðu, men við einari dugnaligari manning av bygdaráðslimum og starvsfólkum er tað eydnast at leggja skútuna siglingarklára aftur við bryggju við góðum førningi. Uttan tykkara hjálp høvdu vit ikki nátt hesi úrslit, og tað vil eg veita tykkum hjartans tøkk fyri, og somuleiðis vil eg ynskja Eivin og hansara bygdaráði Guðs signing og góða eydnu í arbeiðinum framyvir fyri okkara bygd og fólk.

**Lyklatøl fyri Sørvágs Kommunu 1995 - 2001**



| **Sørvágs Kommuna** | **Fíggjarætlan 2001** | | | | | **3.viðgerð** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | **2001** |
| Skattskydug inntøka: | 71.500.000 | 84.054.000 | 89.816.255 | 90.500.000 | 93.700.000 | 100.000.000 |
| Skattaprosent: | 21% | 21,3% | 21,3% | 21,25% | 21,25% | 20,50% |
| Barnafrádráttur: | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| Kirkjuskattur: | 0,25 | 0,25 | 0,25 | 0,25% | 0,25% | |
| | Roknskap | Roknskap | Roknskap | Roknskap | Framrokna | **Fíggjarætlan** |
| **RAKSTUR** | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | **2001** |
| 1000. Byggibúning | 18.004 | 58.323 | 50.417 | 74.628 | 46.000 | 80.000 |
| 2000. Kommunal virkir | 55.883 | 467.788 | 609.180 | 848.827 | 326.256 | 500.000 |
| 3000. Teknisk mál | 1.784.025 | 2.293.359 | 2.034.522 | 2.510.506 | 2.705.800 | 2.595.800 |
| 4000. Skúla- og mentunarmál | 1.929.382 | 1.979.392 | 2.043.587 | 2.190.179 | 2.436.000 | 2.742.831 |
| 5000. Almanna- og heilsumál | 2.362.473 | 2.288.633 | 2.653.096 | 2.912.921 | 2.662.333 | 4.280.600 |
| 6000. Kommunala fyrisitingin | 1.230.045 | 1.387.658 | 1.627.861 | 1.876.146 | 1.482.000 | 2.340.482 |
| 860630. Rentustuðul til landið | 0 | Mótr.innt. | 628.901 | 468.614 | 565.500 | 550.000 |
| **A. RAKSTUR SAMANLAGT** | **7.379.812** | **8.475.154** | **9.647.564** | **10.881.820** | **10.223.889** | **13.089.713** |
| **ÍLØGUR:** | | | | | | |
| 1000. Byggibúning | 16.618 | -28.224 | 235.495 | 337.137 | 163.000 | 260.000 |
| 2000. Kommunal virkir | 182.019 | 522.010 | 722.344 | 654.252 | 736.000 | 740.000 |
| 3000. Teknisk mál | 316.924 | 238.946 | 1.438.532 | 2.069.999 | 2.031.000 | 1.440.000 |
| 4000. Skúla- og mentunarmál | 95.498 | 176.395 | 216.672 | 123.346 | 16.000 | 294.000 |
| 5000. Almanna- og heilsumál | 0 | 0 | 0 | 0 | 5.000 | 0 |
| 6000. Kommunala fyrisitingin | 52.518 | 34.650 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| **B. ÍLØGUR SAMANLAGT** | **663.576** | **943.777** | **2.613.044** | **3.184.734** | **2.951.000** | **2.734.000** |
| **RAKSTUR & ÍLØGUR** | **8.043.388** | **9.418.931** | **12.260.609** | **14.066.554** | **13.174.889** | **15.823.713** |
| | | | | | | |
| Rentuútreiðslur: | 2.120.259 | 1.909.938 | 1.871.540 | 1.231.788 | 1.292.218 | 1.009.000 |
| Rentuinntøkur: | -187.957 | -340.712 | -419.848 | -375.097 | -293.137 | -97.137 |
| **C. RENTUR** | **1.932.302** | **1.569.226** | **1.451.692** | **856.691** | **999.081** | **911.863** |
| | | | | | | |
| **FÍGGJARBROYTINGAR:** | | | | | | |
| Goldin veðhald | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Goldi í kreppulánsgrunn | 705.570 | 807.589 | 0 | 0 | 0 | -634.348 |
| Øking av likvidum | 2.032.480 | 3.459.924 | 1.770.652 | 0 | 0 | 28.982 |
| Aðrar fíggjarbroytingar | 1.008.370 | 0 | 0 | 388.695 | 1.017.197 | 482.026 |
| **D. FÍGGJARBROYTINGAR** | **3.746.420** | **4.267.513** | **1.770.652** | **388.695** | **1.017.197** | **-123.341** |
| | | | | | | |
| Avdráttur | 1.242.408 | 1.393.519 | 1.309.497 | 2.278.285 | 1.201.648 | 2.200.000 |
| Eykaavdráttur | 0 | 0 | 2.000.000 | 2.000.000 | 7.000.000 | 0 |
| **E. AVDRÁTTUR AV LÁNUM:** | **1.242.408** | **1.393.519** | **3.309.497** | **4.278.285** | **8.201.648** | **2.200.000** |
| | | | | | | |
| **ÚTREIÐSLUR SAMANLAGT:** | **14.964.518** | **16.649.188** | **18.792.449** | **19.590.225** | **23.392.815** | **18.812.235** |
| | | | | | | |
| **INNTØKUR:** | | | | | | |
| Hall at fíggja | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Lántøka | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Minking av likvidum | 0 | 0 | 0 | -990.574 | -5.890.926 | 0 |
| Avdráttur av útlánum | -37.290 | 58.766 | -47.349 | -494.242 | -27.989 | -1.047.000 |
| Aðrar fíggjarbroytingar | | -368.643 | -785.711 | 0 | 0 | 0 |
| Skattainntøka (netto) | -14.927.227 | -16.339.315 | -17.959.388 | -18.105.410 | -17.473.900 | -17.765.235 |
| **F. FÍGGJAN SAMANLAGT** | **-14.964.517** | **-16.649.192** | **-18.792.448** | **-19.590.225** | **-23.392.815** | **-18.812.235** |
| Javnvág | 1 | -3 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| **ÚRSLIT áðrenn avdrátt:** | **-4.951.536** | **-5.351.158** | **-4.247.087** | **-3.182.165** | **-3.299.929** | **-1.029.659** |



Hetta var so tað, vit høvdu at borðreiða við ársskiftið 2000/2001, og vónandi kunna tit nú út frá hesum orðum og tølum gera tykkum eina mynd av støðuni. Sjálvsagt eru øll ikki nøgd, og tað verður tað heldur ongantíð, men lat okkum frøðast um tað, sum er gjørt, og vóna at tað, sum liggur á láni, kemur seinni. Er tað nakar, ið saknar ella ynskir meira vitan av almennum slag, ber altíð til at venda sær til skrivstovuna.

Til seinast fara vit á gáttuni til ársskiftið 2000 at ynskja øllum bygdafólkunum eitt av Harranum vælsignað nýggjár, við vónini um at lagnan má laga seg blíð og ljós fyri hvønn einstakan.

Sørvágur tann 30.12.2000

SØRVÁGS KOMMUNA
Petur Kruse
Petur Kruse, formaður

# Sørvágs Kommuna

**Bygdarráðið**
Eivin H Jacobsen
Erik Davidsen
Jákup S Lauritsen
Herálvur Jacobsen
Sólva Thomassen
Kristian Olsen
Berg Rasmussen

**Form**
Eivin H Jacobsen
**Næst.form**
Erik Davidsen

**Fíggjarnevnd**
Eivin Jacobsen form
Erik Davidsen
Herálvur Jacobsen

**Teknisknevnd**
Jákup S Lauritsen form
Berg Rasmussen
Kristian Olsen

**Havnanevnd**
Kristian Olsen form
Jákup S Lauritsen
Sólva Thomassen

**Heilsunevnd**
Berg Rasmussen form
Erik Davidsen
Sólva Thomassen

**Musikkskúlin**
Felagskommunan
Herálvur Jacobsen

**Sørvágs bygdasavn**
Berg Rasmussen

**Umboð Vesturvón**
Eivin Jacobsen

**Umboðsnevnd SEV**
Erik Davidsen
Kristian Olsen tilt.

**IRF**
Sólva Thomasen
Berg Rasmussen tilt.

**Kommunufelagið**
Herálvur Jacobsen
Eivin Jacobsen tilt.

**Felagskommunan**
Jákup S Lauritsen
Sólva Thomassen tilt

**Ellisheimið**
Sólva Thomassen
Eivin Jacobsen tilt

**Ferðslunevndin**
Kristian Olsen

**Valnevndin**
Oddur Petersen form
Hans Olsen
Torkil Haraldsen
Verna Rasmussen tilt.
Sjúrður Mikkelsen tilt
Jóndis Mouritsen tilt

**Barnagarðsnevndin**
Sólva Thomassen
Jákup S Lauritsen
Jógvan Steintún
Leila Simonsen
Sólva Zakariasen

**Bókasavnsnevndin**
Herálvur Jacobsen
Sólva Thomassen
Jákup á Stongum

**Barnaverndin**
Oddur Petersen
Ránnvá á Ørg
Eyð Niclasen
Leo-Hans Mikkelsen
Hildigun Niclasen

**Fundir 2001**
Mán 15.01 – Týs 13.02
Mik 07.03 – Hós 05.04
Mán 14.05 – Týs 26.06
Mik 29.08 – Hós 20.09
Mán 15.10 – Týs 06.11
Mik 12.12

**Sørvág Kommuna**

**Eivin Jacobsen**